

# Spor av kolvetnum í brunninum

Deil:



**Jan Müller**

15.08.2014 - 10:49

Oljan.fo

“Spor av kolvetnum vórðu staðfest, men ikki rakstrarverdar nøgdir.”

Hetta sigur Jarðfeingi frá í morgun í sambandi við, at boringin á Súla Stelkur leitimiðinum er liðug.

Súla Stelkur brunnurin verður nú tiptur og úrslitini greinað við atliti til at nýta nýggju vitanina til betri at kunna meta um váðan við oljuleiting nærhendis.

Hetta er 9. brunnurin, sum er boraður á landgrunninum síðani 2001. Eftir henda er eingin brunnur á skránni tó at tey fimm oljufeløgini, sum enn eru her, eru partur av tilsamans 6 loyvum, har Statoil er fyristøðufelag í 4 og DONG í tveimum.